gult cyan magenta svart

Tíðindablaðið **sosialurin**
Internet: www.sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov

**Marknaðardeild:** Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
**Blaðfólk:** Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dánjal Højgaard, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Høgni Mohr
**Ítróttur:** Jákup Mørk

**Myndamenn:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
**Útgevari, uppseting:** Sp/f Sosialurin
**Bústaður:** Argjavegur 26, Argir

**Postadr:** Postsmoga 76, 110 Tórshavn
**Telefon:** 311820
**Telefax.** 314720
**e-mail:** post@sosialurin.fo
**Lýsingar:** lysing@sosialurin.fo
**Prent:** P/F Prentmiðstøðin

## Fiskivinnan dálkar

### *Oddagrein*

AV og á hava røddir verið frammi í almenna orðaskiftinum her á landi, sum hava torað at talað „Róma“ ímóti. Tvs. sum hava funnist at tí hugburði, sum fiskivinnan hevur til umhvørvið - til tilfeingisgrundarlagið.

EIN teirra - John Smith, sáli - man vera tann, sum oftast tók til orðanna ella rættari treiv í pennin fyri at gera vart við tær negativu avleiðingar, sum fiskivinnan, tá hon ber seg skeivt at - hevur á umhørvið og harvið lívsgrundarlagið. Vit minnast, hvussu hann aftur og aftur vísti á, hvussu ávís veiðuútgerð fer við botninum. Vit minnast greinar hansara um at hava rætta hugburðin til tilfeingið og umstøður tess.

SAMI John Smith var fleiri ferðir innstillaður til at fáa virðisløn fyri sítt slóðbrótandi arbeiði á nettup hesum øki. Og hann var eisini um reppið at fáa hesa viðurkenning.

NÚ kemur so viðurkenningin - um enn ov seint - nú er OSPAR, sambart tíðindunum í útvarpinum í gjár, komið til ta niðurstøðu, at fiskivinnan dálkar og verður m.a. víst til, hvussu reiðskapur, sum verður drigin eftir botninum hevur skaðiligt árin á eitt nú korallir oa.

EINGIN ivi er um, at vit sum liva av tí havið gevur, eiga at geva hesum meira gætur. Vit hava so sanniliga eisini okkara ábyrgd av at halda havið reint.

Í hesum sambandi kunnu vit eisini nevna áhugverdu greinarnar, sum ein fyrrverandi fiskasølumaður hevur skrivað her í blaðnum um nettup sama mál: hvussu vit sjálvi vísa ábyrgd fyri at varðveita eitt reint og sunt umhvørvi. Og her hevur so alingin ein týðandi leiklut eisini. Um somu tíð sum vit menna hesa vinnu, eiga vit eisini at fylgja við, hvussu økta framleiðslan dálkar og annars nervar viðkvæma umhvørvið.

UPPSKOTIÐ um at alivinnan, sum hevur góðar dagar, leggur ávísa upphædd av til nettupp umhvørivsvernd er áhugavert og vóna vit, at tað fæst eitt orðaskifti um hetta málið eins væl og tað, sum OSPAR í næstum fer at leggja fram á fundi sínum í Keypmannahavn.

NÚ oljuvinnan bankar uppá dyrnar eiga vit so sanniliga at vera á varðhaldi og tryggja okkum, at vinnan ber seg rætt og skynsamt at, hvat umhvørvinum viðvíkur. Tað kan kanska ljóða eitt sindur øvugt, men kanska vit sum fiskivinnutjóð hava nakað at læra av frá oljuvinnuni, tá tað ræður um umhvørvið.

***Sosialurin***

# Varmakeldustevna í Fuglafirði

Komandi vikuskifti verður Varmakeldustevnan hildin í Fuglafirði við eini rættuligari fjølbroyttari skrá. Umframt dans og spæl, sum hoyrir einihvørjari stevnu til, eru eisini forkunnugar vitjanir og tiltøk

Danmarks Radios Pigekor er á vitjan. Tey fara at hava ymsar konsertir bæði upp undir og um sjálva Varmakeldustevnuna soleiðis, sum lýst er í skránni. M.a. fara tey at syngja, tá ið Hallbjørg Hansen, býráðsformaður, setur málningaframsýningina í fimleikarhøllini í Fuglafjarðar Skúla fríggjakvøldið, kl. 19.00. Á málningaframsýningini kl. 20 fara Håkan Hagegård og Elisabeth Bostrøm at syngja og spæla fyri okkum.



Sum onnur ár fer Fuglafjarðar Fornminnisfelag at hava eina framsýning í Piddasa handli Niðri í Støð, har Fuglafjarðar Heimavirkið heldur til. Í ár er evnið fyri listamálari okkara, Símun Olivur Johannesen, sum 22. apríl 2000 hevði fylt hundrað ár. Sum vant bjóðar Fornminnisfelagið eisini ein kaffimunn við einum drýlbita afturviðl

Gitna og væl umtókta framsýningin hjá J. P. Gregoriussen við tekningum hansara av gomlu kirkjum okkara letur eisini upp í kjallaranum í Býráðshúsunum. Fuglafjarðar Manskór syngur við upplatingina.

Varmakeldustevnan verður sett kl. 14.00 niðri á Bug við Bókasavnið og Kunningarstovuna av Dánial Vang, lærara og býráðslimi. Ítróttarfólk ganga skrúðgongu og Fuglafjarðar Hornorkestur spælir. Eftir setanina verður farið niðan á leikvøllin, har ársins fótbóltsdystur byrjar kl. 15.00. Hetta verður ikki hissini dystur, tí føroyameistararnir hjá ÍF frá 1979 skulu spæla móti einum liði, sum neyvan kann mannast – hvørki í EM- ella í VM-høpi, tá ið hugsað verður um teir, ið tiknir eru út til dystin. Móststøðuliðið hjá gomlu ÍF-meistarunum verður nevniliga mannað við 11 synum Eyðgerð og Berg Petersen í Fuglafirði. Skuldi 79-liðið havt nakrna fyrimun í mun til Berg-liðið skuldi tað verið, at teir kanska eiga fleiri eykaspælarar at seta inn.

Úti á Varmakeldu – á midnátt – verður varmakeldubálið tendrað, Signar á Brúnni fer at flyta fram røðu og Fuglafjarðar Manskór fer at syngja nakrar sangir og syngja fyri í felagssanginum. Sum undanfarin ár fara vit at sláa ring og vita, um vit ikki kunnu fáa onkra vísu undir fót á sjálvi Varmakelduhelluni undir Guds fríðu náttúru.

Sunnudagin verður fólkafundur heimi á Bug við Bókasavnið kl. 14, har Dávur Winther flytir fram røðu. Sum hini árini verður okkara trúfasta hornorkestur eisini við her og fer at blása nøkur av yndisløgum sínum fyri teim vónandi mongu áhoyrarunum.

Til skemtanar hevur Fuglafjarðar Sjónleikarafelag sett saman og vant eitt Varmakelduteiti, sum neyvan man fara at vera lakari enn seinasta ár.

Við vón um, at stevnan verður væl vitjað og at veðurgudarnir vera til vildar, ynskir Fuglafjarðar Ítróttarfelag øllum vælkomnum á Varmakeldustevnu.



# Bátsbeinabjølgur brunnin

»Bátsbeinabjølgur brunnin« er heitið á fyrsta yrkingasavninum hjá Valdamar á Løgmansbø.

Hóast hetta er fyrsta yrkingasavnið, ið hann hevur givið út, er hann als ikki debutantur innan yrking.

Valdemar er kendur av mongum í Føroyum sum ein av limunum í Systkinum á Løgmansbø, ið hava givið út tvey bond við sjómanssongum eftir Harry á Birtulíð. Mong av løgunum til hesar sangir hevur Valdemar sjálvur smíðað.

Harumframt hevur Valdemar givið út eitt band við songum og løgum, ið hann sjálvur hevur yrkt og smíðað. Mong kenna eisini sangirnar »Robin Hood« og »Agnes Louise«.

Valdemar er 47 ára gamal og ættaður úr Miðvági. Hann hevur yrkt alt lív sítt, og hevur tað at yrkja og syngja altíð havt stóran lut í gerandisdegi hansara og familju hansara.

Savnið er givið út á egnum forlagi, kápumyndina hevur Valdemar sjálvur tikið. Hestprent hevur prenta, savnið er 64 blaðsíður og kostar 100 krónur.

# Nýggj fløga við harmonikutónleiki

Í sambandi við Jóansøkuna, sum í ár varð hildin suðuri í Vági, kom nýggj fløga við harmonikutónleiki á marknaðin.

Tað er vágbingurin Sjúrður Strøm, sáli, sum einsamallur hevur spælt øll løgini á hesi fløgu.

Hetta er tann fyrsta fløgan í eini røð av trimum ella fýra, sum ætlanin er at geva út í næstum.

Ein partur av tilfarinum er fyrr givin út á kasettubondum, men meginparturin eru løg, sum eru funnin í bandasavninum hjá Sjúrða, men ongantíð givin út.

Í áttatiárunum fekk Sjúrður Strøm sær upptøkutól, so hann á tann hátt sjálvur kundu innspæla sín egna tónleik til bandaútgávu. Ein stórur partur av tí tilfarinum, sum Sjúrður legði eftir seg, varð tó ongantíð givin út, men nú er so høvi til at ogna sær hendan tónleik.

– Vit hildu tað vera harmiligt, um hesar upptøkur fóru fyri skeyti, so tí er hendan fløguútgávan komin í lag, siga fyrireikararnir.

Sjúrður Strøm var, umframt at vera útbúgvin smiður, ein sera virkin og avhildin harmonikuspælari í heimbygd síni, Vági, og setti hann har sín serliga dám á bæði veitslur og almennan dans.

Stigtakari til hesa fløgu er Pauli Jacobsen, Tórshavn, og er tað plátufelagið Tutl, sum stendur fyri útgávuni.

**Tøkk**

Vit takka fyri sýnda samkenslu, tá ið maður, pápi, abbi og bróðir okkara,

**Jógvan Davidsen**

doyði og varð jarðaður.

*Fam. vegna*
**Sigrun**





*Tólv eysturslavonar komu fyrrapartin í gjár til Føroya at búgva. Talan er um tvær familjur. Í aðrari familjuni eru 4 børn, og í hinari 3 børn og ein omma.*
**Mynd: Jens Kristian Vang**

# Eg eri bara glaður

*FLÓTTAR. Tólv flóttafólk komu í gjár til Føroya við flogleiðini hjá Maersk. Hóast frøin var stór hendan søguliga dagin, er óvissan millum tey vaksnu í ferðalagnum ikki heilt horvin enn. Men eysturslavonsku børnini eru bara glað*

HØGNI MOHR,
FLOGVØLLURIN

- Eg fari at fáa mær vinir í Runavík og spæla við teir!

Hesi vóru fyrstu orðini hjá einum eysturslavonskum smádreingi, sum kom til Føroya í gjár. Saman við næstringum sínum hevur hann livað sum ólógligur flótti í Danmørk í tvey ár. Men nú er hann sloppin at búgva í Føroyum.

Flogfarið við teimum báðum eysturslavonsku familjunum setti seg í Vágum klokkan 10.55 fyrrapartin í gjár.

Jasmin var glaður, tá ið hann setti fótin á føroyska jørð. Men kortini jarðbundin, tá ið hugsað verður um, at hann bert er tíggju ára gamal. Hann kendi orðið »óvissa«, tá ið vit spurdu hann. Men nú kendi hann seg ikki longur so ótryggan.

- Eg eri bara glaður, segði hann

Tá ið vit kunnaðu unga dreingin um Runavík, har familjurnar fara at búgva fyri fyrst, spílaði hann oyruni út.

- Eg eri spentur, gjørdi hann greitt á flótandi donskum.

**Jákup Pauli við**

Tær báðar eysturslavonsku familjurnar hava farnu tvey árini verið noyddar at krógva seg fyri donsku myndugleikunum, sum ikki vildu hava tær í Danmørk. Tískil komu føroyingar upp í leikin, og við Jákupi Paula Olsen á odda eydnaðist við tógvið stríð at fáa teimum uppihaldsloyvi í Føroyum.

Jákup Pauli Olsen var við í ferðalagnum í gjár. Tað var ein sperdur maður við kóboybksunum hangandi nakað væl niður á endan, sum kortini glaður kundi staðfesta, at tað loysir seg at stríðast fyri tí, ein heldur vera rætt.

- Fyribils eru vit komin á mál, lat hann okkum skilja, meðan hann skundaði sær út í túnið við komuhøllina at tosa við ein bussførara.

**Útsett óvissa**

Mamma Jamal, sum reikaði í kring í komuhøllini, sjónliga rørd, vildi hava eina sigarett at pumpa upp á eina løtu.

- Eg eri eitt sindur í ørviti. Vit høvdu trupulleikar við pappírunum hjá børnunum. Men nú eru vit sloppin inn. Og vit kenna okkum trygg nú. Trupulleikarnir eru fyribils gloymdir. Hóast hetta á pappírinum er ein fyribils loysn, so vóna vit at uppihaldið verður varandi. Nú líta vit framm eftir og fara at royna at skapa okkum eina líkinda tilveru her í Føroyum, segði hon við Sosialin, áðrenn ein grønlendsk kona, sum hevur búð leingi í Føroyum, tók fast í hondina á nýkomnu flóttakonuni.

- Her í Føroyum er gott at vera, segði brosandi grønlendska konan. Føroyski maður hennara tók undir við henni, og nikkaði seigliga.

**Ordiliga fitt**

Fyribils hava familjurnar bert fingið arbeiðs- og uppihaldsloyvi í Føroyum. Hvussu eydnast skal teimum at fáa endaligt loyvi at vera í Føroyum, nú tær ikki sleppa at vera í Danmørk, er enn ógreitt.

Men Jasmin, sum fer í fjórða flokk í summar, hugsaði ikki um paragraffir, lógir og politikk, meðan hann stóð á sólgylta vøllinum í Vágum.

- Eg veit ikki, hvussu føroysk børn eru, men eg vænti, at tey eru ordiliga fitt, segði hann stórbrosandi.



*Tíggju ára gamli Jasmin úr Eysturslavonia var ein av tólv flóttafólkum, sum komu til Føroya í gjár. Tey hava fingið uppihaldsloyvi í Føroyum. Jamal væntar sær nýggjar vinir í Runavík, har flóttarnir fyribils fara at búgva.*
**Mynd: Jens Kristian Vang**

Pakkaferðir summarið 2000
www.smyril-line.fo
SMYRIL LINE
Tel 34 59 00
team 85 · 31 65 11

Danmark
Danland íbúðir
1 vika í frítíðaríbúð
úr 13.219,-

DanCenter summarhús
1 vika í summarhúsi
úr 11.882,-

Noreg
Pers Hotel í Gol
1 vika í summarhúsi
úr 8.905,-

Hetland
Easterhoull Chalets
1 vika í summarhúsi
úr 7.962,-

Bilferia í Europa
Weissenhäuser Strand í Norður-Týsklandi
1 vika á frítíðardepli
úr 13.335,-

• • • fyri 2 vaksin & 2 børn í bili • • • fyri 2 vaksin & 2 børn í bili • • • fyri 2 vaksin & 2 børn í bili • • • fyri 2 vaksin & 2 børn í bili • • •

Pakkaferð Ísland
Key Hotellini
við 7 daga innivist á hotelli í dupultkamari
úr 4.033,-
fyri hvønn

Sigl & Flúgv
Siglt verður annan vegin og flogið hinvegin
Tórshavn - Hanstholm
og Keypmannahavn - Vágar ella hinvegin
úr 2.445,-
fyri hvønn

e-mail: booking@smyril-line.fo